## UTTAN ÚR HEIMI

## Verjar hóttir við lívinum

Sakførararnir, sum hava átikið sær at verja fyrrverandi irakska forsetan Saddam Hussein, hava útsett eina ferð til Bagdad, tí teir tora ikki at fara hagar.

Mohammad Rashdan, sum stendur á odda fyri verjunum, sigur við Reuters, at fleiri av teimum 21 verjunum hava fingið hóttanir teir seinastu dagarnar. Hann sigur, at hóttaninar eru komnar frá irakskum embætismonnum, sum hava sagt, at verjarnir verða skræddir sundur, koma teir til Bagdad. Teir 21 verjarnir og eitt stórt tal av hjálparum skuldu annars fara til Bagdad fyrsta dagin. Ta seinastu tíðina hava teir verið í Jordan, har teir hava fyrireikað seg til rættarmálið. Mohammad Rashdan sigur, at soleiðis sum støðan er, fara teir ongan veg, tí tað er ikki nógv trygt at fara avstað.

Á rættarfundinum í síðstu viku sýtti Saddam Hussein fyri at skriva undir nakað skjal, fyrr enn hann hevði tosað við verjarnar. Verjarnir hava eisini fýlst á, at teir ikki fingu boð um at møta á rættarfundinum.

## Illveður í Evropa

Tað er synd at siga, at summarið hevur verið serliga gott higartil í tí norðara partinum av Evropa, og í gjár regnaði tað av grimd í Týsklandi, Fraklandi og í Suðuronglandi.

Í Miðtýsklandi var vindurin eisini so nógvur, at fleiri trø fóru um koll. Nógvastaðni duttu trøini á vegir og jarnbreytir, og ferðslan var tí nógv tarnað. Í Norðurfraklandi og Suðuronglandi fór streymurin nógvastaðni, og minst 106.000 ensk húsarhald lógu í streymloysi gjáranáttina. Eisini har var nógvur vindur, og fleiri av ferjunum, sum sigla um Oyrasund, máttu avlýsa fleiri ferðir.

Har suðuri í Onglandi fóru bæði trø og elsteyrar um koll í tí nógva vindinum, og myndugleikarnir høvdu úr at gera við at ávara fólk ímóti at koma teimum niðurdotnu elleidningunum ov nær.

## Lummatjóvar í Bergen

Tey, sum ætla sær til Bergen at ferðast, eiga at ansa eftir pengum og øðrum, sum tey hava uppi á sær.

Ta seinastu vikuna hevur løgreglan í Bergen fingið 14 fráboðanir um, at fólk hava mist pengar og annað, sum tey høvdu í lummanum ella í taskuni. Løgreglan sigur, at lummatjóvarnir gera serliga um seg á støðum, har nógv fólk koma saman. Eitt nú hevur tað víst seg, at teir javnan vitja steðgistøðini hjá býbussunum. Fráboðaninar vísa, at lummatjóvarnir taka serliga frá kvinnum. 13 av teimum 14, sum hava vent sær til løgregluna, eru kvinnur, og tann elsta er 85 ára gomul. Hon misti 2.000 krónur, sum hon hevði í einari tasku.

Á løgreglustøðini í Bergen mæla tey fólki frá at hava taskuna á rygginum. Tað besta er at hava hana frammanfyri, og so er tað eisini eitt gott hugskot at hava pengarnar í taskuni og gjaldskortini í lummanum ella øvugt, sigur løgreglan við Bergens Tidende.

## Færri apotek

Fyri trimum árum síðani samdust fleiri flokkar í Fólkatinginum um at skerja talið á apotekum í teimum donsku býunum. Ein partur av semjuni var at broyta skipanina við, at tey stóru apotekini skulu stuðla teimum smáu.

Nú fær semjan avleiðingar. Politiken skrivar, at vandi er fyri, at umleið 60 apotek í býunum noyðast at lata aftur. Tað merkir, at ein fimtapartur av apotekunum í býunum verða stongd. Roknað verður við, at umleið 20 apotek fara at lata aftur tey bæði næstu árini, og at 40 onnur fáa somu lagnu tey næstu fýra ella fimm árini.

Fleiri serfrøðingar ivast í, hvussu skilagott tað er at lata so nógv apotek í býunum aftur, men politikararnir halda uppá, at tað ber væl til at steingja fleiri apotek. Preben Rudiengaard, sum er talsmaður hjá Vinstraflokkinum í heilsumálum, sigur við Politiken, at tað er ikki neyðugt at hava eitt apotek á hvørjum gøtuhorni í býunum.

# Danir innflyta gentur til skøkjuhús

**Alt fleiri og fleiri gentur og kvinnur verða innfluttar til at arbeiða sum skøkjur í Danmark. Fleiri av gentunum eru yngri enn 18 ár**

DANMARK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



Donsku myndugleikarnir hava gjørt av at vísa trimum útlendskum gentum av landinum. Tær eru yngri enn 18 ár og arbeiddu sum skøkjur. Samstundis eru níggju aðrar útlendskar kvinnur vístar av landinum. Tað vísti seg, at tær vóru keyptar til Danmarkar, skrivar Jyllandsposturin.

Sambært løgregluni er tað ofta trupult at siga, hvussu gamlar tær útlendsku genturnar eru. Í fleiri førum hava myndugleikarnir mett, at tær eru ímillum 15 og 18.

Dorit Otzen, sum er leiðari á verkstaðnum Reden í Keypmannahavn, hjálpir løgregluni at finna tær ungu genturnar. Hon sigur, at tað eru serliga gentur úr Nigeria, sum verða seldar keyparum í Danmark.

Fleiri danskir politikarar krevja, at meiri verður gjørt fyri at forða handli við kvinnum og ungum gentum. Teir vísa á, at Danmark hevur staðfest ST-sáttmálan um rættindini hjá børnum, og tí eiga donsku myndugleikarnir at tryggja, at genturnar ikki enda aftur í klørnum á sølumonnunum, tá tær verða vístar av landinum.

# Mijailo Mijailovic skal ikki í fongsul

**Svenska dómsvaldið broytti í gjár fongsulsdómin hjá Mijailo Mijailovic, sum myrdi Onnu Lindh, uttanríkisráðharra**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í vár bleiv Mijailo Mijailovic dømdur lívlanga fongsulsrevsing fyri at hava myrt svenska uttanríkisráðharran, Onnu Lindh, tann 10. september í fjør. Men í gjár bleiv dómurin broyttur. Nú er avgjørt, at drápsmaðurin er ov illa fyri sálarliga, til at hann kann sita í fongsli, og tí skal hann á ein stovn, har hann skal fáa sálarliga viðgerð.

Tá Mijailo Mijailovic bleiv dømdur fyrru ferð, hevði rætturin fingið eina frágreiðing frá einum sálarfrøðingi, sum hevði kannað drápsmannin. Niðurstøðan í teirri frágreiðingini var, at Mijailovic var sálarliga veikur, men at hann tó ikki var so illa fyri, at hann ikki kundi fara í fongsul.

Síðani hevur ein annar sálarfrøðingur kannað Mijailovic, og hansara niðurstøða er, at maðurin er ov sjúkur til at fara í fongsul. Tí avgjørdi Svea Hovrætt, at Mijailo Mijailovic skal á ein stovn, har hann skal fáa sálarliga viðgerð.



*Mijailo Mijailovic skal ikki sita í fongsli. Hann skal á ein viðgerðarstovn, og hann sleppur neyvan útaftur*

Í Stockholm verður sagt, at í veruleikanum merkir úrskurðurin, at Mijailo Mijailovic verður stongdur inni á stovninum alt lívið.

# Kerry og Edwards á odda

**Avgerðin hjá John Kerry at fáa sær John Edwards til varaforsetaevni hevur givið honum fleiri atkvøður**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein kanning, sum sjónvarpið CBS hevur gjørt, vísir, at hevði forsetaval verið í USA nú, høvdu John Kerry og John Edwards fingið 49 prosent av atkvøðunum, og at George W. Bush og Dick Cheney høvdu fingið 44. prosent.

Fyri einum mánað síðani gav ein kanning Kerry 45 prosent og Bush 44 prosent av atkvøðunum.

Kanningin hjá CBS vísir, at 69 prosent av teimum demokratisku veljarunum eru væl nøgdir við avgerðina hjá John Kerry at velja sær John Edwards til varaforsetaevni. Verða teir republikansku veljararnir tiknir við, halda 52 prosent, at Kerry valdi tann rætta mannin.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Ættfrændur hittust

**Á jóansøku varð minnispláta avdúkað í Vági og úr Íslandi komu eini hudrað fólk. Hetta kom av, at familjan Hjelm savnaðist og mintist ein ættfaðir, Íslans við børnunum hjá Akka, sum gekk burtur í 1926, og íslendska kona hansara flutti aftur til íslands. Eini 100 íslendinhgar vitjaðu Vág í samband við avdúkingina**

FAMILJA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Á jóansøku herfyri fekk Hjelm-ættin á Krosslið í Vági vitjan av ættfrændum í Íslandi.

Talan var um eitt ferðalag, ið taldi umleið 100 fólk, og felags fyri hesi var, at tey vóru ættað frá Jógvani og Guðju Hjelm við Krosslið. Tey áttu 9 børn saman.

**Aftur á slóðina**

Nevndi Jógvan Hjelm gekk burtur við motorbátinum "Stjørnuni" á útróðri fyri vestan av Eiðinum í 1926. Umframt Jógvan, sjólótust sonur hansara Martin, beiggi hansara Jaspur og synir hansara Anton og Esbern. Henda dagin gjørdist 15 børn faðirloyingar.

Akka Hjelm við Krosslið átti 4 synir og fingu 3 teirra, Jógvan, Jaspur og Marius váta grøv. Av synum hansara untist tað



*Á jóansøku herfyri fekk Hjelm-ættin á Krosslið í Vági vitjan av ættfrændum í Íslandi*

*Mynd: D.Olsen*

bert tiltikna sjógarpinum Dánjali at liva til ellisár og verða lagdur til hvíldar vesturi á Kirkjukletti.

Kona Jógvan, Guðja, var íslendsk, og stutt eftir at Jógvan var burturgingin, flutti Guðja aftur til Ísland og hevði øll børnini við. Har eru tey vorðin fjølment, og nú á døgum eru um 300 íslendingar, sum eru beinleiðis eftirkomarar frá Jógvani og Guðju Hjelm.

Á jóansøku í ár nýttu so ein partur av eftirkomarunum høvi at vitja aftur á fedranna stað, har ættfrændir teirra í Vági fyriskipaði móttøku av teimum. Í samband við vitjanina var minnissteinur avdúkaður og er hesin minnissteinur ognaður Jógvani og Guðju Hjelm - og børnum teirra. Ætlanin er at minnisplátur skulu setast á steinin, til minnis um tey, sum leitaðu av fedranna garði vestur í hav. Longu nú er ein minnispláta komin á steinin og væntandi verða hinar settar á so hvørt. Í samband við avdúkingina av steininum var samkoma á Krosslið, har røður vóru hildnar, sangir sungnir og fekk Dánjal Johan Hjelm heiðurin at avdúka steinin.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg